gult34 cyan34 magenta34 svart34



# Vinn eina fótbóltsferð






ATLANTIC AIRWAYS

## FCK-Liverpool

vs.




Elsta fótbóltsfelagið í Danmark, KB, fyllir í ár 125 ár, og í hesum sambandi skipar felagið ígjøgnum árið fyri tiltøk av ymsum slag.

Eitt av hesum tiltøkum verður ein dystur ímillum FCK og Liverpool. Nú geva Sosialurin og Atlantic Airways tær møguleika fyri at vinna eina ferð fyri tvey til dystin.

## Kappingarreglur:

Frá týsdegnum, 3. apríl og 15 bløð fram verða puntar, sum til samans geva eina fullfíggjaða mynd av einum kendum fótbóltsandliti, at finna í Sosialinum.
Fyri at luttaka í kappingini ræður um, at hava savnað allar puntarnar saman, soleiðis at fullfíggjaða myndin kann setast saman.
Tá hetta er gjørt, skal blaðsíða 65 i fótbóltsblaðnum, saman við teimum 15 puntunum, sum eru savnaðir sendast til okkum. Seinasta freist fyri innlatan av hesum er fríggjadag 4. mei. Vinnararnir av fótbóltsferðini verða kunngjørdir í Sosialinum týsdagin, 8. mei.

**Loyvt er ikki at senda inn avrit av síðuni ella av puntunum, sum skulu setast í síðuna.**

### Dagsins teigur



gult35 cyan35 magenta35 svart35



FILMSTEIGURIN

# Agent Catwalk

FBI hevur leingi verið í hølunum av landsins mest eftirlýsta brotsmanni, yvirgangsmanninum, sum kallar seg sjálvand Borgarin. Hóast FBI hevur lagt stórt arbeiði í at fanga hann, hava teir alla tíðina verið eitt fet aftan fyri Borgaran, og hava fólkini hjá FBI tí bara muga sligið seg til tols við at vera vitni til enn fleiri yvirgangsatsóknir, bumbur, skottilburðir og morðeldar.

Ein dagin fær FBI eini nýggj boð frá Borgaranum. Í einum kotaðum brævi gevur hann ábendingar um, hvussu hann loypir á næstu ferð. Tað eydnast FBI at loysa kotuna, og tað vísir seg, at tað hesaferð skal ganga út yvir vakurleikakappingina, Miss United States. Nú hava tey so umsíðir møguleikan at vera um ikki annað bara eitt hálvt fet frammanfyri.

Ætlanin er einføld. Ein agentur skal vera við í kappingini sum luttakari, og dómararnir fáa uppgávuna at syrgja fyri, at agenturin verður millum tær fimm, sum sleppa í finaluna. Hvussu trupult kann tað vera? – Tíverri, rættuliga trupult, vísir tað seg, hóast leikarin, ið er agenturin, eingin verri er enn tekkiliga sprundið, Sandra Bullock.

Men aftur til filmin. Millum agentarnar hjá FBI eru milt sagt ikki nógvir, ið sleppa gjøgnum bikini-royndina, og Agen Gracie Hart (Sandra Bollock) vísir seg at vera tað einasta møguliga boðið. Trupulleikin er bert, at hon er líka so ófantalig sum hann havnaarbeiðari og líka so lítið feminin sum ein eplasekkur (hóast felstu okkara ikki kenna hana so…).

Hóast Gracie hart verður tamd, og hóast hon fyri fyrstu ferð í lívinum fær lagt make-up, so skal kortini eitt undur til, fyri at broyta hennara óraffineraða framferðarhátt. Tey fáa henni professionella hjálp. Men bert 48 tímar eru til at broyta hana, Miss Dirty Harriet, til Gracie Lou Freebush, tann perfekti finaluluttakarin. Tað verður vakurleikaserfrøðingurin, Victor Melling, (Michael Caine), ið fær hesa torføru uppgávu litna upp í hendi.

Men hann er ikki tann einasti. Tí Gracie Hart verður hetta ein trupul gongd. Men so hvørt hon broytist til tekkiliga sprundið, vaksur áhugin fyri henni millum mannligu starvsfelagarnar - sjálvt kvinnutemjarin Eric Matthews (Benjamin Bratt) fær brádliga eyguni upp fyri henni…





# Rollingar í París

Chuckie ynskir av øllum hjarta eina nýggja mammu. Ein monsturrobottur í eini frítíðarviðarlund í París brotnar. Tá rollingarnir – Tommy, Chuckie, Dil, Lil, Phil og Angelica – eru á bananum, er tað uppleggið til spennandi og rørandi ævintýr, sum bæði er til vaksin og børn.

Tað verður uppfinnarapápin hjá Tommy, sum verður kallaður til París fyri at loysa trupulleikan, og sum tann fitti maðurin hann er,bjóðar hann bæði familju og vinum við – soleiðis eisini Rollingunum.

Í París letur tað kortini til, at teir finna yvirmann sín, ella rættar – kvinnu. Hon, sum stendur fyri kynisku og óhuganligu effektunum í parkini leitar eftir einum hjúnarfelaga við børnum – helst einum lortið, hon kann domi-nera…!





**Frumsýning**
Fríggjadagin 06.04. kl. $21^{00}$ — Fríggjadagin 06.04. kl. $23^{30}$
Leygardagin 07.04. kl. $21^{00}$ — Leygardagin 07.04. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 08.04. kl. $20^{00}$ — Sunnudagin 08.04. kl. $22^{30}$

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

www.in.fo/havnarbio

# HAVNAR BIO

☆ Tlf. 311956 ☆




**Frumsýning**
Fríggjadagin 06.04. kl. $17^{00}$ — Fríggjadagin 06.04. kl. $19^{00}$
Leygardagin 07.04. kl. $17^{00}$ — Leygardagin 07.04. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 08.04. kl. $16^{30}$ — Sunnudagin 08.04. kl. $18^{15}$




Fríggjadagin 06.04. kl. $23^{00}$ — Leygardagin 07.04. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 08.04. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 30.03. kl. $20^{30}$ — Leygardagin 07.04. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 08.04. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 30.03. kl. $18^{00}$ — Leygardagin 07.04. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 08.04. kl. $17^{00}$

KOMANDI FILMAR




**Frumsýning Mikudagin 11.04.**